DAGFØR
TEG
Sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so ført tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin

# Omanlop i Hvalba leygardagin



*Leygadagin leyp bergið vesturi á Drátti í Hvalba. Lopið er stórt, men leggi serliga til merkis tann stóra steinin, sum liggur í urðini. Hann er sum fleiri hús og semja er um, at hann mann viga fleiri túsund tons. Hetta er uttan iva ein av størstu steinum í Føroyum, kanska tann allarstørsti*

**Steinurin, sum liggur í urðini, man vera størsti steinur í Føroyum**

OMANLOP
*Áki Bertholdsen*

Leygardagin var eitt stórt omanlop vesturi á Drátti í Hvalba.

Omanlop eru ikki so óvanlig. Men tað, sum ger hetta omanlopið óvanligt, er, at tann eini steinurin, sum er lopin oman, er so stórur, at tað nú man vera størsti steinur í Føroyum. Ein partur av honum liggur omaná og nakað liggur niðri í urðini.

Ilt er sjálvandi at meta um vekt, men øll eru samd um, at hann vigar fleiri túsund tons.

Hetta er samstundis største omanlop á Drátti í Hvalba í nýggjari tíð.

Eitt minni lop var í fjør og tá kom ein riva í bergið, líka úr sjónum upp í vøllin. Síðani eru steinar alla tíðina dotnir niður úr, so at tað bleiv loft í berginum.

Hesar seinastu dagarnar er hendan rivan bara blivin størri og størri, so tað hevur altíð verið væntandi, at tað fór at loypa.

Serliga seinasta døgnið, áðrenn tað leyp, hava hvalbingar sæð, hvussu rivan er blivin størri og størri. Hvalbingar, sum vóru vesturi á Drátti leygarmorgunin siga, at tað var merkiligt at síggja, hvussu rivan opnaði seg, og bergið skrædnaði spakuliga, men so týðiliga, frá, at munur sást á. Og stutt eftir døgverða leyp.

Lopið er stórt, tað man vera einar 100 metrar breitt og tað hevur tikið einar seks metrar inn í vøllin.



# Kirkjubøarstólarnir heim

**Um ársskiftið koma Kirkjubøarstólarnir heim eftir 125 ára útlegd**

KIRKJUBØARSTÓLARNIR
*Turið Kjølbro*

Teir hava bíðað leingi eftir heimferðarløtuni, men um eitt lítið ár koma Kirkjubøarstólarnir heim aftur. Heimkoman av Kirkjubøarstólunum byggir á eina tilsøgn frá danska mentamálaráðnum í 1977, um, at føroyingar skulu fáa savns- og fornlutir aftur, sum vórðu fingnir til vega við innsavningum í Føroyum alla 19. øld og sum vórðu sendir av landinum á søvn. Savnslutirnir hava allir sína serstøku søgu, men Kirkjubøarstólarnir, ið eru frá fyrru helvt av 1400-talinum, eru nakað heilt serstakt í hesum høpi. Og líka síðani postskipið Diana stevndi úr Føroyum til Keypmannahavnar við hesum serliga kirkjuinnbúgvi um jóltíðir í 1875, hava føroyingar, ikki minst Jóannes bóndi Patursson í Kirkjubø, arbeitt fyri at fáa føroyingum stólarnar aftur.



*Danska mentamálaráðið tryggjaði sær í tilsøgnini frá 1977, at Kirkjubøarstólarnir kundu koma heim, tá ið nýtilig og tíðarhóskandi framsýningarhøli vóru fingin til vega. Á danska tjóðarsavninum hava Kirkjubøarstólarnir staðið í eini trappuuppgongd, sum vit síggja á myndini*



*Tað var ein søguligur dagur 10. juni í 1999, tá ið táverandi landsstýrismaður í mentamálum, Signar á Brúnni, og Elsebeth Gerner Nielsen, undirskrivaðu avtalu um, at savnslutir úr Føroyum kunnu koma heim aftur eftir 125 ára útlegd.*
Mynd: Jens Kristian Vang

Ætlanin var annars, at Kirkjubøarstólarnir og aðrir fornlutir skuldu koma til Føroya aftur á hvítusunnu í fjør í sambandi við 1000 ára kristnihátíð føroyinga. Á sumri fyri tveimum árum síðani skrivaðu danski mentamálaráðarrin Elsebeth Gerner Nielsen og Signar á Brúnni, sum tá var landsstýrismaður í mentamálum, undir avtalu um, at fornlutirnir koma heim aftur árið eftir.

Í fyrsta umfari fara Kirkjubøarstólarnir og aðrir fornlutir eftir øllum at døma á Føroya Fornminnissavn í Hoyvík, men ætlanin er, at teir eina ferð skulu aftur til Kirkjubøar.

– Tað mest natúrliga er, at teir koma aftur á staðið, haðani teir vórðu fluttir. Í løtuni ber ikki til at goyma teir har, men eg vil virka fyri, at eini høli verða gjørd, trygg og góðkend, har allir lutirnir sum stava úr Kirkjubø, kunnu verða. Eingir pengar eru settir av til endamálið sum er, men tankin hevur verið nógv frammi um at seta pengar av til eini høli, sigur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum.

Áðrenn Kirkjubøarstólarnir koma heim upp undir komandi ársskiftið, skulu teir saman við øðrum savnslutum úr Føroyum vera við á framsýning í Danmark.

# Pippi útseld

**35 ferðir er leikurin spældur og nú verða 10 eykasýningar, sum allar longu eru útseldar**

SJÓNLEIKUR
*Turið Kjølbro*

Seinnapartin mánadagin varð greitt, at allar 10 eykasýningarnar av sjónleikinum Pippi hjá Havnar Sjónleikarfelag eru útseldar. Fyrsta eykasýningin verður í kvøld.

– Tríggjar sýningar vórðu skjótt útseldar, men vit høvdu ikki roknað við, at allar fóru at verða útseldar, í øllum førum ikki so skjótt, sigur Birita Krossteig, dagligur leiðari hjá Havnar Sjónleikarfelag.

Um nakar helt, at tað var í so djarvt av Havnar Sjónleikarfelag at fara undir ein so stóran leik og serliga ein leik um heimskendu Pippi, er viðkomandi farin púra skeivur.



*– Vit eiga heimsins bestu Pippi, sigur Birita Krossteig, dagligur leiðari hjá Havnar Sjónleikarfelag*

– Vit eiga heimsins bestu Pippi. Hon gevur seg meiri enn 100 prosent í hvørjari sýning. Hon dansar, syngur, stendur á hondunum, hoppar, rennur, og leikar í, akkurát sum Pippi ger. Leikstjórin hevur gjørt eitt framúr gott arbeiði, og allir leikararnir og hjálparfólkini tað sama. Har er ein ótrúligur eldhugi. Bæði leikarar og hjálparfólk hava arbeiði við síðuna av, men hóast tey møta hvønn dag troytt og svang, eru tey eftir stuttari løtu til dystin fús, sigur Birita Krossteig.

Venjingarnar av Pippi byrjaðu í august, og ætlanin var, at seinasta sýning av leikinum skuldi vera í november. Nú eru vit farin um ársskiftið og Pippi er framvegis á skránni. Dagligi leiðarin í Sjónleikarfelagnum viðgongur, at leikurin hevur tikið nógva orku. Tað hevur kostað 600.000 kr. at sett hann upp, og hóast 45 útseldar sýningar, er felagið ikki vorðið ríkt av leikinum.

– Í løtuni hava vit ikki nakað ítøkiligt á skránni. Allir teir virknu leikararnir í felagnum hava átt ein leiklut í Pippi so ella so, sigur Birita Krossteig.

Í alt hava 62 fólk verið knýtt at leikinum. Onkur leikari er farin, annar eru komin afturat, og tá ið leikurin verður á palli í kvøld, er ein leikari við fyri fyrstu ferð.

Fleiri eykasýningar av Pippi eru ikki lýstar. Spurningurin er so, um tað ber til hjá Havnar Sjónleikarfelag at gevast at spæla ein so væl umtóktan leik við fullum húsum.

## Mentunarvirkisætlanin undir land

**– Hækkingarnar á fíggjarlógini í ár til mentunarøkið, skulu síggjast sum ein byrjan upp á mentunarvirkisætlanina, sigur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum**

MENTAN
*Turið Kjølbro*

Mentunarvirkisætlanin hjá landsstýrisnum er komin undir land. Í samgonguskjalinum stendur, at ein greiður mentunarpolitikkur skal orðast við støði í millum øðrum mentunarálitinum "Avmarkaður marknaður", sum varð gjørt miðskeiðis í nítiárunum. Seinastu tvey árini hevur verið arbeitt miðvíst við virkisætlanini og løtuni situr deildarstjórin í mentamálastýrinum burturav og leggur síðstu hond á virkisætl-anina. Hon skal verða liðug síðst í hesum mánaðinum og kemur fyri tingið í vár til orðaskifti.

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, vil ikki siga nakað ítøkiligt um innihaldið í virkisætlanini: Ei heldur nakað um, um virkisætlanin fer hava við sær, at meiri pengingur verður settur av á fíggjarlógini til mentan.

– Hækkingarnar á fíggjarlógini til mentunarøkið í ár í mun til í fjør skulu síggjast sum ein byrjan upp á mentunarvirkisætlanina. Játtanin til mentunarøkið er økt við 10 prosentum og í teimum tølum ber til at síggja nakrar ábendingar um, hvat vit kunnu vænta. Eg eri væl nøgdur við virkisætlanina, sigur Tórbjørn Jacobsen.